Tíðindaskriv

## Temakvøld um sorg í Bygdarhúsinum í Miðvági

Sorgin er partur av gerandisdegnum hjá fleiri menniskum í landi okkara, og tað eru nógv, sum púra einsamøll stríðast við at liva seg gjøgnum lívi við hesum.

Samkomur í Vágum hava saman við Aglow skipa fyri tiltakinum um sorg, og vóna tey at fólk við sorg, vinir, grannar og onnur viðkomandi koma til tiltakið.

Tað er ikki óvanligt at hoyra um felagsskapir og tiltøk av ymiskum slag í grannalondum okkara. Í Føroyum er ikki vanligt at skipa fyri temadøgum sum hesum um SORG, men hetta hava samkomur í Vágum og Aglow gjørt nakað við.

Frásøgufólkið eru fólk sum einaferð í lívi teirra hava merkt sorg, og hava mist onkran, tey hava verið sera góð við, og tey greiða eisini frá hvussu tey klára at liva víðari við sorgini, og sakninum eftir tærra nærmastu, sum farin eru.

Tað eru ikki bara tey allar nærmastu, sum hava brúk fyri at luttaka í einum slíkum tema degi, tað eru eisini grannar, vinir og kenningar, sum kunnu fáa gagn av tiltakinum.

Miriam og Viktor Carlsen saman við fleiri, fara at siga frá ,hvussu tey dagliga royna at liva seg gjøgnum trupuleikarnar.

Fyrireikararnir vóna at fleiri koma til temakvøldi sum verður fríggja- og leygarkvøldið kl.20.

VIÐMERKINGAR

# Blaðið GLAÐING millum gamlar sigarettstumpar og fuglaskvett í havnargøtum

**Hans Pauli Strøm,**
*sosialistiskur sjálvstýrismaður og løgtingsmaður fyri Føroya Javnaðarflokk*



»Einasta føroyska magasinið« kallaði nýggja føroyska mánaðarblaðið GLAÐING seg sjálvan í útgávuni, som kom beint undan jólum. Men at døma eftir oddagreinini beri eg ótta fyri hvat intellektuella magasinið hjá sjálvari blaðstjórnini er fylt við. Tí henda oddagreinin var úr enda í annan ein sann partapolitisk lortaspann yvir ein ávísan politiskan flokk í Føroyum, nevniliga Føroya Javnaðarflokk.

Tað er bæði gagnligt og ynskiligt við politiskum kritikki og gjarna hvøssum kritikki av politisku flokkunum. Men vit eiga at krevja eitt minstamark av sakligum argumentum og grundgevingum fyri kritikkinum, um hann skal tæna nøkrum konstruktivum endamáli. Oddagreinin í GLAÐING var fullkomiliga uttan politisk argument, fullkomiliga uttan politiskar grundgevingar – hon var onki annað enn primitiv útspilling úr enda í annan.

Eitt er óhúmskan sjálv í oddagreinini, m.a. tá sagt verður at »lippan í føroyska arbeiðaraflokkinum... veltist millum gamlar sigarettstumpar og fuglaskvett í havnargøtum«. Veit ikki um hetta skal skiljast sum dømi um djúptgangandi journalistikk, ella hetta er ein roynd at hevja seg upp til politiskan poesi.

Eitt annað dømi lýsir eisini tað primitiva andaliga støðið og chauvinistisku argumentatiónina í oddagreinini. Tað verður fyrst sagt at "landsstýrið hevur nápað sjálvstýrisuppskotið hjá Javnaðarflokkinum. Tí kann hesin sami flokkur ikki taka undir við uppskotinum hjá sær sjálvum." Tað er ikki hetta møsnið sum er tað áhugaverda, men "argumentið", sum kemur beint aftaná: "Tí hvør skoytir um at fáa egnu konu sína aftur, eftir at aðrir hava stuttleika sær við henni? Hetta man vera logikkur fyri sjálvt stór smábørn".

Man kann í hvussu er staðfesta, at henda stinkandi chauvinisman er logikkur fyri redaktiónina á GLAÐING, og tað haldi eg ikki tær skulu rósa sær av.

Eitt triðja er tann grundleysi pástandurin og tann óndsinnaða lygnin, oddagreinin slongir út, fullkomiliga uttan nakra grundgeving: at "hesin sonevndi sosialdemokratiski flokkurin er nógv sambandskari enn hann er sosialdemokratiskur. At hann er nógv sambandskari enn sjálvt Sambandsflokkurin, og nógv minni sosialdemokratiskur enn Sambandsflokkurin.... At flokkurin hevur avdúkað seg sum reinan afturhaldssinnaðan sambandsflokk, har støðugt tætt samband við danir verður raðfest langt fram um sosialdemokratiskan politikk..." o.s.fr., o.s.fr., o.s.fr.

Hetta fantasileysa júkið fær ein næstan at hugsa um politiskt woodoo, har gandakallurin roynir at øsa seg sjálvan og sínar áhoyrarar við at messa tær somu fáu illbønirnar yvir fíggindan í teirri villu trúgv at illbønirnar gerast veruleiki við at júka tær uppísamanaftur.

Hinvegin vita allir politiskt edrúir føroyingar, at hesir pástandir eru grundleysir. Ein og hvør, sum fylgir bara tað allarminsta við í politikki, veit við sær sjálvum, at teir eru og vera ikki annað enn lygn, líkamikið hvussu fullveldisfanatikarar júka teir uppísaman aftur. Tað sum tí undrar meg, er hví blaðið GLAÐING er farið at ýla í hesum kórinum. Og tað vil eg spyrja blaðstjóran um, beinleiðis her í blaðnum.

Ein opin spurningur til ábyrgdarblaðstjóran á Glaðing:

Sambært teldutøku føroysku orðabókini hjá Føroya Fróðskaparfelag, 1999, er ein oddagrein: "grein (á føstum plássi) við áskoðan blaðsins á ávíst mál".

Tí spyrji eg ábyrgdarblaðstjóran, Grækaris Djurhuus Magnussen, um hann kann vátta, at "Oddagrein: Tað er synd í Javnaðarflokkinum" í GLAÐING nr. 3, des. 2000, ber áskoðan blaðsins um Føroya Javnaðarflokk?

# Viðmerking til tíðindasending í Degi og Viku 4. jan. 2001

**Nevndin í Føroya Postfelag**

Eftir at Sjónvarpið tann 4. januar 2001 bar tíðindini um blaðútbering, har postverksstjórin partvís leggur Postfelagið undir at vera ein forðan fyri kvøldútbering, kunnu vit ikki lata vera við at koma við nøkrum viðmerkingum

Okkum er fallið fyri bróstið, at eingin hevur havt viðmerkingar til tað láturliga og einvegis innleggið í Degi og Viku, har sagt varð, at bløðini lógu á posthúsinum í 16 tímar, uttan at verða borin út. Eingin frágreiðing varð givin, um hví hetta var so, uttan eitt suff frá Postverkstjóranum Bergur í Garði, sum lat standa eftir, at Postfelagið átti sína stóru skuld í hesum

Tá postverksstjórin vísir á, at hann ikki hevur møguleikar at geva bløðunum eitt tilboð um kvøldútbering, tí sáttmálin, hann og Fíggjarmálastýrið hava gjørt við Postfelagið, er ein forðan. Til hetta kunnu vit upplýsa, at sáttmálin felagið hevur við Fíggjarmálastýrið ikki er stórt annarleiðis, enn sáttmálin hini feløgini hava.

Men lat okkum koma til sannleikan í hesum máli.

Dimma og Sosialurin sum eru fyrrapartsbløð, hava fyrr verið skrivað um dagin og út á kvøldið, og so komin á posthúsið til arbeiðið morgunin eftir, kl. ca. 4.30 og borin út í meginpartin av landinum sama fyrrapart.

Men tá blaðið skal koma út dagin fyri útgávudagin, hava tey, sum skulu finna og skriva tíðindi, bert fyrrapartin at gera hetta í, tí prentingin fer í gongd stutt eftir middag.

Blaðútgevarnir hava so eisini ta meining, at bløðini skulu berast út um kvøldið, fyri sama prís, sum um tey vóru borin út, saman við hinum postinum, í vanligari arbeiðstíð.

Vónandi er tað onkur, sum skilir, at tað ikki ber til at bera post út tvær ferðir um dagin fyri sama prís.

Blaðútgevarnir og Postverksstjórin skilja tað helst ikki???

# Suðuroyggin og framtíðin

**Svenning Borg, Vágur**

Nú hevur so stórkapitalurin avgjørt, at oljuútgerðarhavnin skal liggja í Havn ella Runavík og ikki í Suðuroynni, har ið tað var mest natúrligt, at hon lá. Suðuroyingar sleppa als ikki uppí part, sjálvt um oljuøki er beint sunnanfyri Suðuroynna, so skal oljuhavnin verða norðanfyri, hetta kunnu okur slettis ikki góðtaka. Hvat høvdu runavíkingar sagt, um tað var øvugt, at oljan var beint sunnanfyri hjá teimum og suðuroyingar komu og tóku sær av oljuni á teirra sjóøki, neyvan høvdu teir góðtikið tað og tað gera okur suðuroyingar heldur ikki.

Eg vil hervið heita á allar suðuroyingar um at standa saman og gera uppreistur. Suðuroyingar hava gjørt tað fyrr og øll vita okur, hvussu tað endaði, okur skulu hava oljuútgerðarhavnina og oljumálastýrið her í Suðuroynni, tað skal ikki borast á okra øki uttan at tað skal ganga útfrá Suðuroynni, tað hava okur krav uppá.

Sum gongdin er nú, doyr oyggin út eftir einari stuttari tíð og kunnu okur ikki bara lata standa til, uppreistur er neyðugur fyri at fáa tað, sum okra er, tí nú er Suðuroyggin ein minniluti í Føroyum og verður viðfarin sum aðrir minnilutar úti í heimi.

Atkvøðan í apríl um at Føroyar skulu loysa frá Danmark er slettis ikki neyðug í Suðuroynni, her er einans ein fólkaatkvøða neyðug og tað er um at loysa Suðuroynna frá restini av Føroyum. Eftir hesum seinasta málinum um oljuhavnina man neyvan nakar suðuroyingur vera í iva longur um, at einasti og beinasti vegurin fyri at yvirliva í Suðuroynni er loysing frá restini av Føroyum.

Suðuroyggin við sínum havleiðum, átti at verið ein av heimsins ríkastu oyggjum, men sleppur hon ikki at gagnnýta sínar havleiðir, hevur hon lítlar møguleikar, tí skulu okur ikki lata aðrar taka møguleikan frá okum og krevja okur tí alla umsitingina av oljuríkidøminum at vera her í oynni.

# ítróttur

Nr. 8 • fríggjadagur • 12. januar 2001 • 75ð. árgangur • www.sosialurin.fo



*Gunnar Mohr er eftir drúgt tíðarskeið í nevndararbeiðinum hjá HB farin frá sum formaður. Nýggjur formaður er Birgir Enghamar*

# HB havt aðalfund

**Eftir drúgva tíð í felagsarbeiðinum er Gunnar Mohr nú farin frá sum formaður í felagnum. Nýggjur formaður er Birgir Enghamar**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tey bæði feløgini í HB, Havnar Bóltfelag og P/F Havnar Fótbóltur, høvdu aðalfund mikukvøldið. Væl av fólki var møtt upp, og sum skilst, var talan í allar mátar um ein siðiligan fund.

**Gunnar frá**

Størsta broytingin í bygnaðinum hjá sjálvum Havnar Bóltfelag er eftir fundin, at formaður felagsins ikki longur eitur Gunnar Mohr.

Við Sosialin sigur Gunnar, at hann sjálvur helt, at tað nú var tíð at lata aðrar kreftir sleppa framat.

–- Eg havi meira ella minni verið við í nevndararbeiðinum síðani 1986, har av eini 8-10 ár sum formaður, so tað er ivaleyst sunt, at onnur eisini sleppa fram at nú, heldur Gunnar, tá vit spyrja hann, hví hann nú leggur frá sær.

**Eingin kollvelting**

Nýggjur formaður í felagnum er Birgir Enghamar, sum í nógv ár hevur verið aktivur í felagnum í nógv ár. At tað er eitt sunt felag, sum Gunnar leggur eftir sær, er einki at ivast í, og Birgir tykist heldur ikki at ætla sær nakra kollvelting, nú hann er vorðin formaður í felagnum.

– Tað verður kanska meira at fáa onkur innanhýsis viðurskifti at glíða betri. Tav er altíð okkurt, sum kann gerast eitt sindur léttari, og tað er hetta, sum eg fyrst og fremst fari at leggja meg eftir. Ítróttaliga er lítið, sum kann gerast betri, sigur Birgir, og sipar til, at HB ongantíð hevur havt eitt somikið gott ár í ungdómsdeildunum sum í fjør.

Umframt omanfyristandandi, so sigur Birgir, at tað eisini eru nøkur nýggj krøv, sum feløgini nú skulu uppfylla. UEFA pengarnir, sum verða latnir teimum liðum, sum ikki megna at spæla seg fram til europeisku kappingarnar, seta krøv av ymsum slag viðvíkjandi ungómspolitikkinum í feløgunum, og eisini hetta ætlar Birgir at fáa í rættlag. HB man annars vera tað felag í landinum, sum er best fyri í so máta, tí bygnaðurin við einum móðurfelag og einum felag til eliituna ger, at greiður skilnaður er niður til ungdómsdeildina.

**Partafelagið**

Eisini í sjálvum partafelagnum hava onkrar formligar broytingar verið. Steinfinnur Mittilstein er framvegis stjóri í felagnum, men í nevndini eru broytingar framdar. Fyrst og fremst tí talið av nevndarlimum nú er lækkað úr fimm niður í fýra.

Úr nevndini eru farnir Gunnar Mohr og Poul Michelsen, meðan Birgir Enghamar er komin inn í nevndina. Aðrir nevndarlimur eru Kaj Leo Johannesen, formaður, Niels Christian Nolsøe og Høgni Mikkelsen.

# Nøgdur hóast undirskot

**Nevndarformaðurin í P/F Havnar Fótbóltur sigur ársúrslitið, eitt hall á 200.000 kr., vera á leið tað, sum nevndin hevði roknað við**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Hóast undirskot, so er Kaj Leo Joahannesen nøgdur um úrslitið, og hann ivast ikki í, at stovnanin av partafelag var ein røtt avgerð at taka fyri trimum árum síðani*

Ein partur av aðalfundinum hjá P/F Havnar Fótbóltur var framløga og góðkenning av roknskapinum, og hóast talan var um eitt hall fyri árið, so var eingin ónøgd um hetta.

Kaj Leo Johannesen er nevndarformaður í partafelagnum, og hann heldur í øllum førum ikki, at hallið er nakað, sum skapar órógv í felagnum.

– Vit hava nú trý ár á baki, og eg haldi, at vit nú eru um at finna tað støðið, sum føroyskur fótbóltur kann koyra á. Eftir at útreiðslurnar í fyrstani vóru stórar, eru vit nú í ferð við at rationalisera raksturin, og eitt nú eru lønarútreiðslurnar minkaðar við einari helvt í mun til árið í fjør. Úrslitið er tó eitt hall upp á 200 tkr., men hetta høvdu vit roknað við, og so væntandi fer raksturin at hvíla í sær sjálvum um eini tvey ár.

Av øðrum orsøkum til hallið sigur formaðurin, at áskoðaraintøkurnar í ár vóru heldur minni enn mett, og so sjálvandi tað, at HB í ár luttók í Inter-Toto kappingini, sum kostar væl minni av sær fíggjarliga enn eitt nú kappingin fyri meistaraliði.

– Sum felagið varð sett saman at byrja við, so varð eisini roknað við, at tað helst ikki skuldi ganga ov long tíð millum meistaraheitini, men tá vit eru lidnir við rationaliseringarnar, roknað vit ikki við, at hetta kann gerast nakar trupulleiki.

Spurdur um úrslitið inniber nakran vanda fyri, at felagið kann koma í fíggjarligar trupulleikar, sigur Kaj Leo, at tað ger tað ikki.

– Sum sagt, so vita vit nú betri enn fyri trimum árum síðani, hvussu vit kunnu fáa handilin at mala runt, og framyvir verður tað eftir hesum leisti, at vit fara at koyra. Eitt nú fara tit ikki at síggja HB fara út at bjóða upp á spælarar, ella rinda stórar lønarupphæddir fyri at halda upp á leikarar.

**Nýggjan sponsorsáttmála**

Fyri at kunna leggja ætlanir fram í tíðina, er sjálvandi eisini neyðugt, at felagið skapar sær eitt somikið trygt inntøugrundarlag sum gjørligt. Hesum viðvíkjandi sigur Kaj Leo, at felagið júst hevur undirskrivað nýggjan sponsorsáttmála við Føroya Banka, sum sostatt framhaldandi verður høvuðsstuðul felagsins.

– Vit hava júst eina avtalu, sum eg haldi vera sera góða fyri báðar partar. Hon forpliktar báðar vegir, men hetta er ikki meira enn náttúrligt, sigur Kaj Leo, sum í sama viðfangi leggur afturat, at felagið eisini hevur gjørt sponsorsáttmála við Føroya Shell, sum hereftir verður 2. sponsor.

**Røtt avgerð**

At enda sigur Kaj Leo Johannesen, at nú partafelagið hevur trý ár á baki, er kanska eisini rætt at líta aftur um bak, fyri at meta, hvørt nýggi bygnaðurin var ein røtt avgerð at taka í síni tíð, og hesum er hann ikki í iva um.

– At vit tá liðaðu felagið sundur, eri eg ikki í iva um var ein røtt avgerð. Áðrenn var tað ofta soleiðis, at arbeiðið við fyrstu deild fór avstað við alt ov nógvari orku í felagnum, men hendan trupulleikan síggja vit ikki í dag. Tvørtur ímóti hava vit sæð, at meðan ein bólkur tekur sær av fyrstu deild, so hava onnur fingið nógv meira orku leysgivna til ungdómsarbeiðið, og úrslitið av hesum kann so avgjørt ikki gerast nógv betri enn í fjør, sigur ein væl nøgdur nevndarformaður at enda.